Bilar

Nr. 141 • hósdagur • 26. juli 2001 • 75. árg.

Honda Stream – 7 persóna luksur MPV

Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil, við nýggja 7 persóna bilinum, Honda Stream, ið hevur sera smart design

Honda Stream 1.7i LS

Motorur:	1.7 litur 4 syl 16V 125 hk
0-100 km/t:	11,1 sek.
Bensinn˝tsla:	13.0 km/l
Dekkst¯dd:	195/65-15
St¯dd og vekt:	
Longd	457,0 cm
Breidd	169,5 cm
HÊdd	159,0 cm
Eginvekt	1350 kg
Totalvekt	2000 kg
PrÌsur:	kr. 224.750,- 2.0i ES kostar 269.750,- (aut.gear. + 20.000,-)
S¯luumboð:	Sp/f Norðbil Oyggjarvegur FO-100 TÛrshavn Tlf. 313707

Eins og Honda Civic, hevur Stream eisini gearstongina í instrumentborðinum

Umframt at Honda Civic er komin við heilt nýggjum og øðrvísi modellum, er eisini ein 7 persóna luksus MPV, Honda Stream, komin á marknaðin. Hesin vendir sær bæði til vinnulívsfólk og til tey, sum ynskja sær ein smidligan og rúmligan familjubil

BILAR
Magnus Gunnarsson

Honda Stream, ið hevur hevur eitt smart og streymlinjað design, er ein r˙mligur 7 persÛna MPV við 4 hurðum, 3 rekkjur av setrum og stÛrari bakl˙ku. Setrini framman kunnu stillast elektriskt upp og niður. Tey Ì miðjuni kunnu leggjast saman ella koyrast heilt fram, eins og tað Ì miðjuni kann br˙kast sum borð. Aftastu setrini kunnu leggjast niður Ì d˙rkið, soleiðis at viðf¯risr˙mið verður stÛrt og r˙mligt. Eins og Civic hevur Stream eisini gearstongina Ì instrumentborðinum.

i-VTEC

Stream er fyrsti bilur við n˝ggju i-VTEC motorunum, sum eru sera orkusparandi, d·lka lÌtið og trekkja vÊl. TvÊr motorst¯ddir eru at velja Ìmillum. Ein 1.7 litur við 125 hk, hesin koyrir 13,0 km/l og toppferðin er 190 km/t. Hin er ein 2.0 litur við 156 hk, koyrir 11.6 km/l og toppferðin er 205 km/t. 2.0 motorurin fÊst eisini við automatiskum gearum. Hetta er ein framkomin Grade Logic gearkassi við 5 gearum.

Seinni sum van

N˝ggja ªwishbone´ skipanin við hjÛlupphangunum ger, at fjaðraskipnanin virkar eins vÊl við einum sum sjey persÛnum Ì bilinum. Bilurin er sera vÊl ˙tgj¯rdur við nakkastuðlum við ¯ll 7 setrini, el-hitað setur framman, ið kunnu stillast upp og niður, el-sÌðuspegl við hita, el-r˙tar aftan og framman, air-condition við pollenfiltri, elektroniska startsperru.

Honda Stream, ið er ein fj¯ltroyttur bilur við gÛðum koyrieginleikum, kemur seinni sum van. Við tað at d˙rkið er heilt slÊtt, verður hetta ein sera arbeiðsligur bilur til vinnufyrit¯kur.

Við tað at Honda Stream hevur stuttan front, og bilurin er lutfalsliga stórur, verður gott pláss til 7 persónar í bilinum

ÚT AT KOYRA

Fleiri nýggir BMW bilar eru á veg

Ein nýggjur BMW-700 verður sýndur fram á Frankfurt Motorshow í heyst. Í 2003 kemur ein nýggjur BMW-500, eins og ein BMW-600

BILAR
Magnus Gunnarsson

Komandi BMW-500, sum kemur · 2003, fer at lÌkjast tÌ n˝ggja BMW-700, sum kemur · marknaðin Ì heyst. ÕDanmark fara BMW-700 at kosta fr· 1.3 mill. og uppeftir. Teir fyrstu BMW-500 prototypurnar koyra longu forklÊddir ymsastaðni Ì heiminum. Aksulfr·st¯ðan · n˝ggja BMW-500 verður longri og fyri at lÊtta um bilin verður karrossarÌið fyri ein part ˙r aluminium.

Kelda: FDM / Motor

BMW-500, sum kemur í 2003, líkist BMW-700, sum kemur á marknaðin í heyst

Coupé útgávan verður BMW-600, men við luksusútgerðini frá 700 røðini. Ætlanin er ikki at gera bilin sum cabriolet

Ford og PSA samstarva um dieselmotorar

Saman við Ford hava Peugeot og Citroën, PSA, samstarvað um ein heilt nýggjan dieselmotor við beinleiðis innspræning

BILAR
Magnus Gunnarsson

Ikki fÊrri enn 23 ymiskar ˙tg·vur av motorum skulu framleiðast teir komandi 18 m·naðirnar. Tann fyrsti verður ein 1.4 litur, sum skal n˝tast til Peugeot 307, Ford Focus og tann komandi Fiesta. Framleiðslan verður 6.000 motorar um dagin, við m¯guleika fyri at framleiðslan ¯kist upp til 9.000. Eitt av endam·lunum við hesum samstarvi er at spara ˙treiðslur, og tÌ eru 60 prosent av komponentunum Ì ¯llum motorunum eins.

Kelda: Bilen Motor & Sport
Mynd: FDM / Motor

Komandi Fiesta kemur at njóta gott av samstarvinum við Peugeot og Citroën um nýggju dieselmotorarnar

Dekkalarmar verða standard

Lear Corp, ið er triðst¯rsti veitari til bilÌdnaðin Ì USA, og t˝ska fyrit¯kan Beru skulu saman gera eina ·varingarskipan, sum sigur fr·, hvussu tr˝stið er Ì dekkunum. Ors¯kin er at nÛgvar ·lvarsligar ferðsluvanlukkur koma av at trupulleikum við einum ella fleiri dekkum.

Kelda: Motor Magasinet

Spanskur mini Opel

Opel hevur tikið avgerð um at gera eina Ìl¯gu upp· 3.5 milliardir krÛnur tey nÊstu f˝ra ·rini, til framleiðslu av einum n˝ggjum mini bili · teirra sponsku bilverksmiðju Ì Zaragoza, har Opel Corsa eisini verða framleiddir.

Kelda: Motor Magasinet

Suzuki í Ungarn

Suzuki Motor Corp. seta n˙ 370 milliÛnir krÛnur Ì bilverksmiðjuna, sum teir hava havt Ì Ungarn sÌðan 1992. Umframt Suzuki Swift, ið er mest seldi bilurin Ì Eystureuropa, gera teir eisini Wagon R. Suzuki er heimsins st¯rsti framleiðari av sm·um bilum.

Kelda: Motor Magasinet